DEKKMASTER.FO

…tá ið prísurin eisini er avgerandi!

# Kulur skutari



EINANS 13.900,-

GIANTCO

**Giantco Sprint** er ein nútímans skutari við øllum hentleikum.
**Ein kvalitets-skutari fyri lágprís!**

**Fæst í litunum:**
- Bláur/svartur
- Reyður/svartur
- Gulur/svartur

**Hevur m.a.**
- 4-takts motor
- 12" alufelgur v/poleraðum kanti
- Polerað bremsugreb
- Hvít blunkljós

# Felgur við dekkum



**Stingray**
17"……………úr **kr. 9.980,-**
18"…………úr **kr. 10.880,-**



**RS4**
18"……………úr **kr. 9.990,-**



**Razor Black**
17"……………úr **kr. 8.980,-**
18"……………úr **kr. 9.990,-**
19"…………úr **kr. 11.880,-**



**GTR-4**
17"…………úr **kr. 10.880,-**
18"…………úr **kr. 12.880,-**
19"…………úr **kr. 13.980,-**

**…og nógvar aðrar flottar felgur**



SERTILBOÐ 1.990,-

**Aytobe GPS'ari**
GPS'ari við fullfíggjaðum korti yvir Vestureuropa. Alt er »Plug and Play«.

**Nógv góð og bílig dekk á goymslu!**

www.dekkmaster.fo · info@dekkmaster.fo · tel. 227 000

**Mentamálaráðið**
FÓLKASKÚLADEILDIN

## Starv sum fyrstilærari í Nólsoyar skúla

Starvið sum fyrstilærari í Nólsoyar Skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2008.
Í Nólsoyar skúla verða 24 næmingar í 7 árgangum, og 3 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir fyrstalærara, sum**
- hevur leiðslumyndugleika og hug og hegni at átaka sær fyrisitingarligar uppgávur
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður, trivnað og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk skúlans
- skal skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- skal fremja gott samstarv millum skúla og heim
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Harumframt skal fyrstilærarin**
- vera førur fyri at skipa eina mennandi starvsfólkaleiðslu og tryggja, at lærarar skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- hava hugsjónir um skúlamenning, og hvussu menningarætlanin verður sett í verk

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, at umsøkjarar hava leiðsluroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Nólsoyar skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 31.2 og 31.3 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **24. juni 2008.**

Umsóknin verður stílað til:
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til **Jenny Lydersen**, undirvísingarleiðara, ella **Olaus Jespersen**, deildarstjóra, **tlf. 355050**.

Tórshavn, 6. juni 2008
Mentamálaráðið

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.




> Telefonráðgeving  > Anonymitet
> Tagnarskyldu  > Stundir at lurta

Bláí Krossur
www.blakross.fo

# Førara til betongpumpubil

**Søkt verður eftir førara til betongpumpubil.**

Talan er um spennandi arbeiðið við nýmótans pumpubili.

Ring til blandimeistaran og hoyr nærri um starvið.

Byrjast kann beinanvegin ella eftir nærri avtalu

J&K

J & K Betong · Á Hjalla · FO-188 Hoyvík
Tlf 315060 / 585025 · betong@jkp.fo